# Stoltenberg í hernað fyri Noðuratlantsbólkin

**Bólkarnir, ið Norðuratlantsbólkurin hevur sett at greiða ymisk viðurskifti, hava nú fingið manning. Thorvald Stoltenberg er stjørnuskotið á einum væl mannaðum liðið av serfrøðingum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Thorvald Stoltenberg skal hjálpa Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi í kanningunum um uttanríkis- og verjupolitikin í Norðuratlantshavi.

Tað var ikki heilt lítið. ið Norðuratlantsbólkurin setti sær fyri, tá hann vitjaði í Føroyum á kunningarferð fyri kortum. Teir tríggir, Lars Emil Johansen, Kuupik Kleist og Tórbjørn Jacobsen, varamaður fyri Høgna Hoydal, settu út í kortið, at teir miðjaðu ímóti at seta altjóða serfrøðingar at arbeiða saman í verkætlanarbólkum, har evni við stórum týdningi fyri bæði Grønland og Føroyar skuldi viðgerast. Endin skuldi so vera, at ein ráðstevna skal haldast um úrslitið hjá hesum nevndum á leið um várið 2003.

Fýra bólkar verða settir, og hesir fáa hvør sín evni og arbeiðssetning at arbeiða eftir. Uppgávurnar hjá bólkunum eru sum fylgir: At kanna og lýsa hernaðarliga virksemið í Grønlandi og Føroyum og búskaparligar fylgjur av herstøðunum, at lýsa fólkarættarligu støða og rættindi Føroya og Grønlands, at lýsa sosialu viðurskiftini hjá grønlendingum í Danmark, og at kanna møguleikarnar fyri bøttum ferðsluviðurskiftum í Norðuratlantshavi.



*Thorvald Stoltenberg skal fyri Norðuratlantsbólkin á Fólkatingi hyggja nærri at uttanríkis- og verjupolitikki í Norðuratlantshavi.*

Higartil eru bólkarnir vorðnir partvíst mannaðir við serfrøðingum. Gudmundur Alfredsson og Raoul Wallenberg, báðir frá lærda háskúlanum í Lund, skulu vera við í kanningini um fólkarættaligu støðu Føroya og Grønlands. Eisini Peter Gerner frá lærda háskúlanum í Aarhus verður við í hesum bólkinum.

Henriette Berthelsen og Aviâja Helms skulu eisini luttaka í arbeiðinum um sosialu viðurskiftini hjá grønlendingum í Danmark.

Og seinasta navnið á listanum er sum sagt Thorvald Stoltenberg.

### Ikki hvør sum helst

Norðuratlantsbólkurin fegnast um, at tað hevur eydnast teimum at finna hesi fólkini, ið teir meta vera væl fyri til at gera tað ásetta arbeiði. Ætlanin er, at tað, ið restar í av manning, verður funnið í nærmastu framtíð. Tórbjørn Jacobsen, limur í Norðuratlantsbólkinum, fegnast um, at tað hevur eydnast bólkinum at fingið hendur á Thorvaldi Stoltenberg eins og hinum serfrøðingunum. Hann sigur, at teir enn bert hava samskift skrivligt. Hann hevur játtað at vera við, og hann hevur eisini fingið arbeiðssetningin, ið nevndin hevur at arbeiða eftir, sum varð lagdur fram, tá bólkurin vitjaði í Føroyum.

–Vit vilja hava fólk, ið kunnu geva bólkinum røttu tyngdina, og tað meta vit, at Thorvald Stoltenberg kann gera. Hann er ikki hvør sum helst, og hann hevur drúgvar royndir, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Thorvald Stoltenberg er fyrrverandi uttanríkismálaráðharri og verjumálaráðharri í Noregi, fyrrverandi ST-friðarsemingsmaður, fyrrverandi ST-hákommisserur, og núverandi leiðari fyri Reyða Krossi í Noregi. Tórbjørn Jacobsen upplýsir harafturat, at teir hava fleiri persónar í kikaranum, men teir hava ikki fingið endalig svør enn.

# Tryggja trygdina

**Tað tekur tveir og ein hálvan dag at taka eitt trygdarskeið á RGIT í Aberdeen. Skalt tú arbeiða umborð á oljuboripalli í Norðsjónum krevst eitt tílíkt trygdarskeið. Prísurin liggur um 6.000 kr. fyri skeiðið**

OLJUVINNA
*Orð og myndir:*
*Heri á Rógvi*

**Aberdeen:** Í oljuvinnuni – í øllum førum hana, sum vit kenna til – verður stórur dentur lagdur á trygd og umhvørvi. Oljufeløgini fáa strong krøv at fylgja, og sjálvi eru oljufeløgini eisini komin á lagið, at tað slepst ikki uttanum hetta, og feløgini seta sjálvi alsamt strangari krøv.

Eins og annað arbeiðið í Norðsjónum, ið føroyingar kenna til, er tað ikki heilt vandaleyst at arbeiða umborð á einum oljuboripalli.

Á RGIT í Aberdeen kunnu fólk fáa neyðuga skeiðið, soleiðis at tey eru før fyri at arbeiða umborð á einum oljuboripalli. Sjálvandi er hetta treytað av, at tey hava aðrar góðkenningar upp á pláss, treytað av í hvørjum arbeiðsbólki hesi eru í. Eitt nýta teir í Aberdeen aloftast eitt tvey vikur langt skeið, sum lærir arbeiðsmenn at arbeiða við boriútgerð umborð á boripalli.

RGIT stendur uppruna-liga fyri Roberg Gordon Institute of Technology. Hóast nýggir eigarar eru komnir til, so er navnið varðveitt partvíst, og tað eitur í RGIT Montrose, og tað er ein privat fyritøka, ið kallast fyri RGU, ið eigur og rekur RGIT Montrose.

Á skeiðnum, ið vanliga taka hálvan triðja dag skulu nemingar læra um tey neyðugu trygdarviðurskiftini, ið krevjast umborð á einum oljuboripalli ella riggi. Skeiðið tekur samanlagt einar 20 tímar, og næmingarnir skulu ígjøgnum nógv ymisk øvilsir, sum fyri tað nógva ganga fyri seg í einum hyli.

Millum teir meira dramatisku partarnar av skeiðnum er parturin, har ein eftirgjørd tyrla verður blakað hylin og bæði fer undir og rullar runt. Her verða tað – eins og í hinum pørtunum av skeiðinum – sett hørð krøv til næmingarnar. Teir skulu halda seg undir vatninum í frið í nøkur sekund og skulu síðani svimja út úr eftirgjørda vrakinum. Gjørdu næmingarnir ikki soleiðis var eingin bardóm, og teir vórðu settir at gera venjingina umaftur. Tað fylgja allatíðina fleir hjálparfólk við næmingunum, soleiðis at trygdin allatíðina verður hildið í hásæti.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvørji krøv verða sett í teimum ymsu pørtunum av oljuheiminum, men í Norðsjónum er eitt tílíkt skeið nóg mikið, men teir bjóða eisini onnur skeið, alt eftir tørvi.

### Altíð ein leiðari

Tað er høgur sum lágur, sum skal á eitt tílíkt skeið, sum vanliga verður rópt fyri eitt HSE-course (Health Safety and Environment). Minstakravið er nevniliga, at øll tey, ið skulu vera nátt umborð á einum boripalli ella riggi skulu hava tikið eitt tílíkt skeið. Tað er sostatt ikki galdandi fyri tey, ið vitja ein pall ein dag. Eisini verða fólk send á skeið av fyritøkunum eftir ávísum áramáli.

Á RGIT verður upplýst, at tað í neyðstøðu altíð verður ein leiðari í teimum bjargingarbólkum, sum verða til undir bjargingunum. Tað er næstan sum í filmunum, varð sagt.

Kostnaðurin fyri eitt skeið liggur 500 pund ella gott og væl 6.000 kr. Harafturat hesum kemur so kostnaðurin fyri ferðing og uppihald, soleiðis at tað kann gerast eitt kostnaðarmikið tiltak at fara undir. Mest vanligt eru tað oljufeløgini, ið senda fólk á skeiðini og harvið eisini gjalda fyri tey, men ein og hvør kann melda seg til eitt skeið, og hetta verður eisini sagt at vera eitt skilagott stig, um hugurin til at fara upp í oljuvinnuna.



*Hjá RGIT hava tey gjørt eina tyrlu, sum endar í neyðstøðum, og tað so uppgávan hjá næmingunum at bjarga sær burturúr neyðstøðuni.*



*Tað mesta av venjingini á skeiðinum fer fram í einum svimjihyli, har neyvt eftirlit er.*



# Mjólk, Roksimalena og ein fantasibók



*Tríggjar nýggjar føroyskar barnabøkur eru nú komnar út á marknaðin. Í gjár var bókaframløga í Smiðjuni í Lítluvík, har allir høvundar og teknarar, uttan Edward Fuglø, sum ikki fekk verið við vegna forfall, vóru við*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tríggjar uppruna føroyskar bøkur eru nú komnar út á marknaðin. Bøkurnar eru barnabøkur og eru tær allar serstakar á hvønn sín hátt**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

"Margreta og mjólkin", "Í Geyma" og "Geislasteinar" eita bøkurnar. Høvundarnir eru Sigga Vang, Dánial Hoydal og Sólrún Michelsen.

Margreta og mjólkin er ein smábarnabók. Hon er ætlað børnum undir skúlaaldur. Bókin vísir á einfaldan og stuttligan hátt, hvaðani mjólkin kemur. Heilt frá kúnni og til hon stendur klár á borðinum í einum mjólkapakka. Bárður Oskarson hevur myndaprýtt bókina, og hon er umbrotin og prentað hjá Einars Prent. Margreta og mjólkin kostar 50 krónur í bókahandlunum.

Í Geyma er ein barnabók, væl egnað at lesa upp fyri børnum um seks ára aldur og eldri, og allar barnsligar sálir fara ivaleyst eisini at trívast í Geyma. Í Geyma gongur fyri seg í hundanstíðini og har hitta vit Roksimalenu, Hermus, Svansibob, Tíðindafróða og nógv, nógv onnur. Bókin er bygd uppá orðaspæl, har orð, sum ongin veit, hvaðani tey koma, eru sett upp á ein skemtiligan og barnsligan hátt. Hanni Bjartalíð hevur teknað myndir til bókina, meðan Hestprent hevur umbrotið og prentað. Bókin um Hermus, Svansibobb og øll hini er 166 blaðsíður og kostar 140 krónur í bókhandlunum.

Triðja bókin, Geislasteinar, er ein fantasibók. Hon er onnur bókin í eini fantasirøð. Í 1999 kom fyrra bókin, Hin útvaldi, út. Sjálvt um bókin er eitt framhald, so ber væl til at lesa bøkurnar hvør sær. Edward Fuglø hevur teknað myndirnar í bókini, eins og kápumynd. Henda bókin er eisini prentað og umbrotin á Hestprent. Geislasteinar fæst nú til keyps í bókhandlunum og kostar hon 125 krónur í bókhandlunum.

Til ber at síggja allar upprunamyndirnar til tær tríggjar bøkurnar í Smiðjuni í Lítluvík, har Hanni Bjartalíð eisini sýnir fram egnar myndir.

# Mjólkin kemur ikki frá lastbilinum

**Sigga Vang hevur givið sína fyrstu bók út. Hon eitur Margreta og mjólkin, og snýr seg heilt einfalt um, hvaðani mjólkin kemur**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Flest øll foreldur hava upplivað, at barn teirra hevur spurt, hvaðani mjólkin kemur. Ikki bert tann, ið stendur klár í pakkanum á borðinum, men eisini móðirmjólkin, sum er ein heilt náttúrligur partur av lívinum.

Sigga fekk hugskotið til bókina eftir at hon hevði átt dóttir sína. Mjólk er nakað náttúrligt, og fólk í øllum aldri drekka hana.

– Hugskotið er kanska eitt sindur av barnanostalgi, sigur Sigga flennandi. – Tá eg var lítil búði eg í Danmark. Einaferð tá eg var og vitjaði systkinabarn mítt, sum búði á einum bóndagarði, fóru vit at berjast um, hvaðani mjólkin kom. Eg segði, at hon kom úr lastbilinum, meðan systkinabarnið segði, at hon kom úr kúnni. Eg tapti sjálvsagt, men tað er helst haðani, at grundarlagið til bókina upprunaliga kemur frá.

### Øll sløg av mjólk

Bókin er ein smábarnabók, sum er ætlað teimum heilt smáu til børn beint undir skúlaaldur. Hon er ikki bert um kúgvamjólk, men eisini um pulvurmjólk til lomb og kálvar og um bróstamjólk og pulvurmjólk til børn.

– Hetta er ein háttur at binda øll tey ymsu "mjólkarsløgini" saman, greiðir Sigga frá. – Bókin er um Margretu, sum fer við pápanum til Kaldbaks, har hon sær, hvaðani mjólkin hon drekkur kemur. Har fær hon eisini okkurt at vita um pulvurmjólk bæði til djór og menniskju.

Sigga ætlaði upprunaliga at tekna myndirnar til bókina sjálv. Men tá hon sá myndirnar hjá Bárður Oskarsyni á ólavsøkuframsýningini dámdi henni tær so væl, at hon helt, at hann skuldi myndprýða bókina.

Sigga er 27 ár og býr í London, har hon fæst við film og at skriva. Ætlanin hjá henni er at lesa film seinni í ár.



*Sigga Vang hevur skrivað bókina Margreta og mjólkin, sum er ein søga um, hvaðani mjólkin kemur. Bárður Oskarson hevur myndprýtt bókina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*